## Danska arbeiðsloysið veksur

Arbeiðsloysið í Danmark veksur spakuliga. Eftir einari uppgerð gjørdust umleið 11.300 danir arbeiðsleysir í fjør. Tað merkir, at danska arbeiðsloysið liggur um 5,4 prosent. Fyri einum ári síðani var tað 5,0 prosent.

Donsku búskaparfrøðingarnir høvdu væntað, at arbeiðsloysið fór at veksa í fjør, og teir siga nú, at hendan gongdin fer at halda fram í hvussu er fyrra hálvár í ár, til gongd aftur kemur á heimsbúskapin.

Samstundis vísa búskaparfrøðingarnir á, at samanborið við onnur lond er arbeiðsloysið í Danmark framvegis lítið. At 5,4 prosent av arbeiðsmegini einki arbeiða hava er ikki nakar trupulleiki í sjálvum sær, siga búskaparfrøðingarnir, men teir halda tað kortini vera hugstoytt, um gongdin heldur fram ov leingi afturat. Veksandi arbeiðsloysi kann fáa fólk at brúka minni pengar, soleiðis at tann privata nýtslan steðgar upp, og tað kann so aftur elva til størri arbeiðsloysi, siga búskaparfrøðingarnir.

## Koyrast av landinum

Myndugleikarnir í India siga, at í minsta lagi 20 milliónir fólk úr grannalandinum Bangladesh eru komin ólógliga til landið tey seinastu árini. Stjórnin vil vera við, at fremmandafólkini eru ein hóttan fyri indisku trygdina, og tí er nú avgjørt at senda tey heimaftur. Hví tey verða mett sum ein hóttan, hava indisku myndugleikarnir ikki sagt nakað um.

Innanríkisráðið í New Dehli viðgongur, at hetta er ein møtimikil uppgáva, men hevur kortini sett sær fyri at fáa tey fremmandu av landinum í tíðarskeiðinum frá apríl til juni í ár.

At kalla øll, sum eru komin úr Bangladesh til India, eru muslimar, og indisku myndugleikarnir hava fyrr róð uppundir, at fleiri teirra hava verið uppi í ymsum ólógligum virksemi. Eitt nú eru summi teirra løgd undir at hava hjálpt pakistansku fregnartænastuni at njósnast í India.

## Kanna løgregluna

Í Russlandi er innanríkisráðið farið at kanna áhaldandi skuldsetingar um korrupsjón innan løgregluna, og seinastu tíðina hava myndugleikarnir kannað viðurskiftini hjá 12.000 løgreglumonnum.

Innanríkisráðið í Moskva ásannar, at tað er rættiliga vanligt, at løgreglumenn bróta landsins lógir, og at teir javnan taka ímóti mutri frá fólki, sum vilja sleppa undan bót ella rættarsókn. Ein kanning í oktober í fjør kom til tað úrslit, at løgreglumenn, embætismenn og pantifútar taka ímóti meiri enn 150 milliardum krónum í mutri um árið.

Hetta hevur havt við sær, at nógvir russar hava ikki álit á løgregluni og øðrum myndugleikum, og sambært tíðindastovuni Itar-Tass er eitt endamál við kanningini hjá innanríkisráðnum júst at bøta um umdømið hjá løgregluni.

## Rættarmál útsett

Rættarmálið í Grikkalandi ímóti kurdiska PKK-leiðaranum Abdullag Øcalan og ellivu øðrum monnum er fyribils útsett.

Teir ellivu menninir eru ákærdir fyri at hava smuglað kurdaleiðaran til Grikkalands í 1999 og harvið hótt landsins trygd. Málið er útsett, tí teir griksku verjarnir hjá Øcalan hava ikki fingið nakra váttan frá honum um, at teir kunnu verja hann í rættinum. Øcalan situr sjálvur í fongsli í Turkalandi.

PKK hevur í nógv ár stríðst fyri kurdiskum sjálvsstýri har eysturi í Turkalandi, men gavst við bardaganum, tá Øcalan varð tikin fyri trimum árum síðani.

# Bush slakar fyri Norðurkorea

**Hóast tað sera hvassa orðalagið siga norðurkoreansku myndugleikarnir seg vera til reiðar at samráðast við Suðurkorea. Samstundis roynir amerikanska stjórnin at draga í land.**

NORÐURKOREA
*Árni Joensen:*



*George W. Bush, forseti er nú til reiðar at samráðast við Norðurkorea um landsins kjarnorkuverkætlan.*

Alment eru teir norðurkoreansku myndugleikarnir hvørki til at høgga ella stinga í í hesum døgum. Fyrradagin varð skipað fyri stórum mótmælisfundi í høvuðsstaðnum Pyongyang, har umleið ein millión fólk komu at vísa, at tey stuðla stjórnina og Kim Jong-il, stjórnarleiðara í stríðnum við USA um landsins kjarnorkuverkætlan.

Eygleiðarar siga, at tann sera avgjørda norðurkoreanska støðan er komin óvart á George W. Bush, forseta og stjórnina í Washington, og at tað hevur fingið forsetan at hopa aftur eftir hæli seinastu dagarnar. Fyri bert fáum døgum síðani legði USA ógvusligt trýst á Norðurkorea, men fyrrakvøldið segði Bush, at hann hevur ongantíð havt nakra ætlan um at søkja at landinum. Tvørturímóti er hann sinnaður at samráðast fyri at loysa kreppuna.

Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri hevur fyrr sagt, at fyri USA ger tað ikki stórvegis mun, um talan er um eitt stríð við Irak ella Norðurkorea, men hesum eru eygleiðarar ikki samdir við honum í. Teir vísa á, at í Irak-spurninginum snýr tað seg um at forða fyri, at Irak útvegar sær kjarnorkuvápn, meðan Norðurkorea eftir øllum at døma longu hevur slík vápn. Tí ber ikki til at samanbera tær báðar ósemjurnar, og eygleiðararnir halda, at innast inni iðrar George W. Bush seg um, at hann á sinni samanbar Norðurkorea við Irak og Iran.

Amerikanska stjórnin er eisini undir hørðum trýsti úr Suðurkorea og Japan, sum vilja hava samráðingar við Norðurkorea, og nú er eisini líkt til, at norðurkoreanar eru sinnaðir at samráðast. Í hvussu er hava teir skotið upp, at umboð fyri Norður- og Suðurkorea skulu hittast tann 21. januar. Upprunaliga avtalaðu tey bæði londini at hittast tann 14. januar at viðgera ymisk sínamillum viðurskifti, men hildið verður, at ósemjan við USA um kjarnorkuverkætlanina nú fer at standa ovast á dagsskránni.

# Bin Laden neyðtók meg!

**Rithøvundurin Kola Boof vil vera við, at hon var fangi hjá yvirgangsleiðaranum Osama bin Laden í fýra mánaðir. Hann neyðtók og bukaði meg, sigur hon.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Tann 33 ára gamla Kola Boof er ein tann best umtókti afrikanski rithøvundurin í USA, og bøkur hennara eru millum tær mest seldu.

Herfyri noyddist hon at taka ein son sín úr skúlanum, tí søgur vóru farnar at ganga um, at hann er sonur sjálvan Osama bin Laden. Fleiri myndamenn, sum fingu fatur á søguni, vóru skjótir á skúlan at taka myndir av dronginum.

–Tað er lygn. Osama bin Laden er ikki pápi at nøkrum av mínum børnum, stóð í einari kunngerð frá Kolu Boof fyrr í vikuni.

Kola Boof, sum upprunaliga er ættað úr Sudan, vil vera við, at hon hitti Osama bin Laden í Marrakesh í Marokko á heysti í 1995. Í einari grein í New York Times stutt fyri jól vildi blaðið vera við, at hon hevði virkað sum skøkja í Marokko, og at tann kendi yvirgangsleiðarin var ein av viðskiftamonnum hennara. Men tað avsannar Kola Boof.

Hon sigur, at ein dagin kom Osama bin Laden inn á gistingarhúsið, har hon búði.

– Hann neyðtók meg, og tað gjørdi hann eisini fleiri ferðir afturat. Eg slapp ongan veg, tí hann læt sínar menn ansa eftir mær. Hetta stóð við í fýra mánaðir, og hesa tíðina var eg stutt sagt fangi hansara. Men so fann hann eina franska kvinnu og eina jødiska kvinnu, og so slapp eg leys, sigur Kola Boof.

# Mafian hjálpti Berlusconi

**Eitt sakarmál ímóti einum av næstu medarbeiðarunum hjá italska forsætisráðharranum hevur avdúkað, er stjórnarleiðarin eftir øllum at døma hevur havt gott samband við mafiuna.**

ITALIA
*Árni Joensen:*

Upplýsingarnar eru komnar fram í einum sakarmáli ímóti Dell'Utri, sum fyrr hevur verið stjóri í einari reklamufyritøku, sum Silvio Berlusconi, forsætisráðharri eigur. Fyrrverandi stjórin er ákærdur fyri at hava havt samband við mafiuna.

Í sambandi við málið avhoyrdi ein dómstólur á Sisilia fyrradagin fyrrverandi mafialeiðaran Antonino Giuffre, og í rættinum greiddi hann frá, at Berlusconi hevði havt ein fund við teir fremstu mafialeiðararnar á Sisilia í áttatiárunum. Fundurin var heima hjá Berlusconi í Milano.

Sambært Giuffri endaði hetta við, at mafian fór í hernað ímóti teimum kristiligu demokratunum, og endin var, at flokkurin fór í uppløysn í 1993. Um hetta sama mundið fór Berlusconi undir at skipa sín egna flokk, Forza Italia, sum skuldi fáa fatur á veljarunum, sum teir kristiligu demokratarnir høvdu havt. Tað eydnaðist eisini.



# Maersk Air økir Føroyaflúgvingina

**Í summar fer Maersk Air at flúgva ein túr eyka um vikuna millum Billund og Vágar. Samstundis fer felagið at bjóða ymisk nýggj tilboð í samband við Billund-rutuna**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Maersk Air fer at økja um flúgvingina millum Billund og Vágar í summar, Eisini fara nýggj tilboð at verða givin, sigur Steffen Riiskjaer, sølustjóri hjá Maersk Air í Billund*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Vágar:** Ein túr afturat um vikuna og nýggj tilboð til Føroyingar, sum ætla sær til Jyllands at halda frí, er nakað, Maersk Air fer at bjóða í summar.

Steffen Riiskjaer, sølustjóri hjá Maersk Air í Billund, sigur, at frá 5. apríl og hvønn leygarmorgun fram til 25. oktober fer Maersk Air at flúgva úr Billund til Føroya. Flogið verður úr Billund klokkan trý korter til átta og úr aftur Vágum klokkan hálvgum tíggju.

Talan er um nýggjan frekvens á eini verandi rutu, sum hann tekur til.

Steffen Riiskjaer sigur, at tey hava merkt ein vaksandi áhuga millum føroyingar, sum vilja ferðast til Vestur-Danmark, sum hann nevnir tað, og setir hann tað í samband við, at tað búgva nógvir føroyingar í Jyllandi.

Samstundis er eisini ein vaksandi áhugi millum danir, sum vilja vitja Føroyar, men helst vilja gera skjótt av.

Og tað fer so at bera til við hesum nýggja túrinum. Tí nú verður møguligt at bjóða dønum eins og føroyingum vikuskiftisferðir millum Billund og Vágar. har flogið verður út leygardag og heim aftur mánadag, tá annars vanliga verður flogið.

Í háárstíðini - um summarið - verður vanliga eisini flogið aðrar dagar, sigur Steffen Riiskjaer og nevnir eitt nú mikudag og fríggjadag, soleiðis at komandi summar kann roknast við, at flogið verður millum Billund og Vágar mestsum hvønn dag í viku.

Maersk Air arbeiðir við nýggjum tilboðum til teirra, sum hava hug at vitja Jylland í Summar, sigur sølustjórin í Billund.

Eitt nú fer einaferð í januar at verða lýst við einum familjupakka, har vitjan í Legolandi er íløgd. Talan kann vera um túr, har flogið verður úr Føroyum leygardag og heim aftur mánadag.

Eisini fer Maersk Air at bjóða viðskiftafólki ein flogpakka við summarhúsleigu og billeigu íroknaðum. Tann túrurin fer so at vara frá leygardegi til leygardag, sum eisini passar til teir dagar, ein vanliga leigar summarhús í eina viku.

Hinvegin verður eisini skipað fyri bólkaferðum, sgur Steffen Riiskjaer. Tann 5. apríl sendir blaðið Check In, sum Billund Lufthavn gevur út, ein bólk av lesarum sínum til Føroya.




